FYLGISKJAL 4

LM-064/2020

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Stjórnarskrivstovan

Dagfesting
14. august 2020

Okkara j.nr.
20/02765-2

Málsviðgeri
Randi Saxov

Tygara j.nr.

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
EIRARGARÐUR 2
100 TÓRSHAVN
amr@amr.fo

**Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Ráðgeving og heimild til at fíggja bústaðarbygging)**

Vísandi til omanfyri nevnda lógaruppskot, hevur Tórshavnar kommuna hesar viðmerkingar:

Tórshavnar kommuna vil, at allar familjur skulu hava møguleikan at búseta seg í Havnini – høgum sum lágum.

Tað er eitt gott mál at seta sær fyri at økja og fjøltátta um útboðið av bústøðum kring landið, og kommunan er glað um, at settar verða 100 mió. kr. av til leiguíbúðarverkætlanir, ið kunnu fata um Tórshavnar kommunu.

Kommunan metur tó ikki, at uppskotið í nóg stóran mun hjálpir uppá íbúðarneyðina í miðstaðarøkinum, har tørvurin á íbúðum er størstur.

Stóru plássini draga fleiri aftrat sær, ikki minst ung fólk og ungar familjur. Hetta er ikki nakað serføroyskt fyribrigdi, og sama mynstur sæst í grannalondunum. Eftirspurningurin eftir og tørvurin á øðrvísi bústaðarhættum, so sum leigu- og lutaíbúðum, er tí stórur í høvuðsstaðnum, tí øll megna ikki at byggja og keypa.

Í sambandi við at Tórshavnar kommuna í juni 2018 orðaði ein bústaðarpolitikk, staðfesti kanningar ein stóran tørv á leiguíbúðum. Kanningin vísti at 27% av teimum spurdu ynsktu at búgva til leigu. Ein serliga stórur tørvur er ímillum tey ungu at búgva í leiguíbúð. Útvið 70% av teimum ungu ynsktu at búgva til leigu og ímillum tey eldru vóru tað 28%.

Sambært tølum, sum Tórshavnar kommuna fekk frá Bústøðum, tá bústaðarpolitikkurin varð í gerð, ynsktu 58 % av teimum, sum standa á bíðilistanum, at búgva í leigubústaði í Suðurstreymoy. Sambært tølum frá Bústaðum juli 2020, so svara 91% á bíðilistanum, sum nú telur 2665 limir, at tey ynskja at búgva í miðstaðarøkinum.

Í okkara grannalondum er lutfallið av ymsu bústaðarsløgunum nakað væl øðrvísi. Meðan vit, sambært kanningini í sambandi við bústaðarpolitikkin, bert hava 1% skipaðar leigubústaðir á føroyska bústaðarmarknaðinum, hava grannalondini ímillum 19% og 40%.

Ítøkiligar royndir eru gjørdar frá kommununnar síðu at fáa gongd á leiguíbúðir, men hetta hevur víst seg at vera avbjóðandi. Fyrst varð roynt at bjóða eitt grundøki út til at byggja leigu- og eigaraíbúðir, men einki boð kom inn. Síðani varð eitt grundøki bjóða út í almennari sølu við teirri treyt, at leiguíbúðir skuldi byggjast og við sera fáum øðrum krøvum. Bert eitt boð kom inn. Kommunan fegnast um, at tað eydnaðist og at byggingin er ígongd.

Á fundum við byggivinnuna verður víst á váðan, sum er í byggitilgongdin. Vandi er fyri, at peningurin ikki verður vunnin inn aftur, tá ið byggingin er liðug. Kommunan hevur víst á ein leist, har byggivinnan stendur fyri bygging og byggiváða, ímeðan pensjónsfeløg síðani kunnu yvirtaka bygningarnar og reka útleiguvirksemi. Pensjónsfeløgini hava tó ikki víst nóg stóra áhuga fyri hesum.

Tískil loyvir kommunan sær at ivast í, um byggivinnan ella íleggjarar, innanfyri teir karmar, sum eru í dag, og við hesum broytingum, eru áhugaðir í at byggja og reka leiguíbúðir.

Tá ið eingin áhugi er, so er heldur ikki talan um eitt virksemisøki, ið er í kapping. Tí gevur tað onga meining at forútseta hetta í lógaruppskotinum.

Samanlagt ætlar landsstýrið við hesum lógaruppskotinum, at økja lániheimildina hjá Bústøðum við 400 mió. kr. Av hesum eru 200 mió. kr. markaðar til almannagagnligar bústaðarverkætlanir.

Hinar 200 mió. kr. eru býttar upp í 100 mió. kr. til vanligar bústaðir í økjum kring landið, har "grundarlag ikki er fyri kapping við privat virkandi". So hesum fær høvuðsstaðurin ikki lut í.

Tær seinnu 100 mió. kr. eru sum nevnt til verkætlanir í økjum, har tað er"grundarlag fyri kapping við privat virkandi og á javnsettum grundarlagi við atliti at avkastkrav og atgongd til kommunal grundøkir'. Men, sum víst á omanfyri, so metir kommunan ikki, at har er talan um eina kappingarstøðu, og tí er avleiðingin, at borgarar í høvuðsstaðnum - ásett við løgtingslóg - koma at rinda meira í leigu enn aðrir føroyingar.

Sambært bústaðarpolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna verður ynskt, at bæði Bústaðir og privata vinnan eru við til at útvega leigubústaðar. Mett verður framvegis, at tørvurin er so mikið stórur, at grundarlag er fyri, at eisini tað privata kann byggja og reka leigubústaðir. Men hetta lógaruppskotið betrar ikki um avbjóðingarnar hjá tí privatu vinnuni. Kommunan mælir tí landsstýriskvinnuni til at koma við øðrum átøkum, sum kunnu betra um møguleikarnar hjá privatu vinnuni, og sum ikki samstundis avmarka møguleikarnar hjá Bústøðum at byggja, soleiðis at borgarar í Tórshavnar kommuna kunnu fáa ein leigubústað til ein rímiligan leiguprís.

Upphæddin uppá 100 mió. kr. er alt ov lítil, tá ið hugsað verður um, hvussu stórur eftirspurningurin eftir leiguíbúðum er, sambært sera langa bíðilistanum hjá Bústøðum.

LM-064/2020

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

TK ivast eisini í hugtakinum "miðstaðarøki". Er tað Tórshavnar kommuna íroknað tær smærru bygdirnar í kommununi. Ella eru tað íroknað suður-Eysturoy við atliti at undirsjóvartunlinum.

Tórshavnar kommuna tekur ikki undir við uppskotinum, tí munur veðrur gjørdur á kommununum í Føroyum. Við hesum uppskotinum verður tað enn dýrari hjá familjum at fáa sær bústað frá Bústøðum í Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna mælir tí til, at landsstýriskvinnan tekur uppskotið aftur ella í øðrum lagi at broyta tað, so at allar kommunur í Føroyum verða javnsettar.

Vinarliga

Annika Olsen
borgarstjóri